

**Andrass Skaalum**
*Limur í Umboðsráðnum fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna*

# Eik... og hvat so?

Ognarfelag Tryggingartakaranna er størsti leikari í føroyska fíggjarheiminum.

Hetta er ein stór ábyrgd og krevur skynsemi og reiðiligheit av øllum leikarum á vølli.

Hvat veit tryggingartakarin í grundini um sínar ognir, og hvør umsitur hesar?

Hvussu er við gegni og kompetansu?

Nevndin í Ognarfelag Tryggingartakaranna (OT) verður vald av umboðsráðnum, ið eru 23 fólk, sum ein lutfalsliga lítil partur av tryggingartakarunum hevur valt. Tað eru helst bert umleið 15% av tryggingartakarunum, ið greiða atkvøðu til umboðsráðið. Av hesum tykist meginparturin at vera atkvøður frá vinnulívskundum í tryggingini.

Nevndin í OT velur nevndina í TF-Holding, sum stjórnar hesum maktdepli og setur stjóra at standa fyri dagligu umsitingini.

Við keypinum av EIK er OT vorðin størsti leikari í føroyska fíggjarheiminum, og er tað umráðandi, at somu skipanarligu feilir, sum vóru gjørdir í gamla Eik, ikki verða endurtiknir.

Hyggja vit eftir, hvussu OT er skipað, og hvør ger sína ávirkan galdandi, sær tað tíverri út til, at vandi kann verða fyri, at somu skipanarligu skeivleikar kunna verða endurtiknir.

Tað eru nógvir nevndarsessir í samtakinum, og kann tað vera freistandi at sleppa at sita í fleiri av hesum fyri góða løn, samstundis sum ein umsitur Føroya størsta maktdepil.

Tryggingartakararnir, ið eiga OT, fáa sera lítið innlit í, hvussu felag teirra arbeiðir, hvussu peningurin verður plaseraður, og hvørji fólk umsita ognirnar og hvussu. Tú kann royna heimasíðuna hjá felagnum at kanna, hvat tú fært at vita um hetta.

Sum limur í umboðsráðnum fái eg heldur ikki av eintingum stórvegis kunning um hesi viðurskifti.

Okkurt smávegis fæst tó at vita, um ein leitar í roknskapum hjá felagnum og á Skráseting Føroya.

Ein kann so spyrja hví hetta skal vera so?

Ein afturlatin skipan, har fá vita hvat hendir, kann gerast gróðrarbotnur fyri avgerðum og handlingum, ið ikki høvdu verið framdar um opinleiki valdaði, í ringasta føri kann vandi verða fyri undirhondsavtalum.

Hugsa tær, um eg sum umboðsráðslimur t. d. fái tilboð um nevndarsessir fyri at velja onkran ávísan persón inn í nevndina, ella okkurt líknandi?

Spurningurin er, um javnvág er millum kompetansu og ábyrgdir í øllum liðum í samtakinum.

Kann tað t. d. verða vandi fyri, at nevnd og/ella umboðsráð ótilvitað kunnu verða drigin uppá tráð?

Tað er tí umráðandi, at OT og samtakið gerst munandi meira opið, og at skilagóðar reglur verða gjørdar fyri, hvussu ognirnar hjá eigarunum kunnu umsitast á besta hátt. Atlit eigur at takast fyri gegni, kompetansu og at ov nógv samanfall ikki er av persónum í teim ymsu nevndunum.

Samstundis eigur at verða hugt at, um støðan hjá nevndunum, sum eftirlit og ábyrgdarhavandi kann styrkjast, soleiðis at vandi ikki gerst fyri, at ein stjóri fyri samtakinum kann stýra nevndini meir enn gott er.

Somuleiðis eigur at verða hugt eftir uppgávum og umstøðum hjá umboðsráðnum.

Hevur umboðsráðið nøktandi innlit í at røkja uppgávur sínar?

Fær tað havt eftirlit við nevndini, sum tað skal velja á aðalfundum?

Ætlar tú tær á aðalfund í OT, mást tú tekna teg áðrenn mánadagin, tað kann tú gera her: www.bricksite.com/andrass/aalfundurin

Tú kann lesa meir um aðalfundin her: www.bricksite.com/andrass/aalfundur-ot-2011

www.taks.fo

## SERLIG KUNNGERÐ UM SKATTSKYLDUGA INNTØKU FYRI 2010

Øll, sum eiga at verða sett í skatt, skulu geva upp skattskyldugu inntøku sína, áðrenn freistirnar nevndar niðanfyri eru úti.

Tilber at skráseta Sjálvuppgávuna á **eSkatt.fo** ella at flýggja skjølini til TAKS eftir **9. mars 2011**.

Tann **1. apríl 2011** verður klárt at geva upp uttanlandsinntøkur 2010 umvegis eSkatt.fo

**Vanligir skattgjaldarar**
Sjálvuppgávan 2010 hjá skattgjaldarum, ið ikki hava roknskaparskyldu, skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi **1. mai 2011**.

Tann 9. mars 2011 verður Framskundaða Skattauppgerðin (**bláa skjalið**) og Sjálvuppgávan (**grøna skjalið**) send út. Øll, sum fáa Sjálvuppgávu, skulu lata hana innaftur.

Er talan um uttanlandsinntøku skal serstakt Fylgiskjal til Sjálvuppgávuna (**reyða skjalið**) sendast inn saman við Sjálvuppgávuni. Skjalið fæst á heimasíðuni frá 7. mars 2011 ella við at venda sær til TAKS tlf 35 26 00. Tó ber til at skráseta uttanlandsinntøkur umvegis eSkatt.fo frá 1. apríl 2011

Tann Framskundaða Skattauppgerðin (**bláa skjalið**) verður send teimum skattgjaldarum, ið TAKS heldur seg hava rættar upplýsingar um í fyribilsskattaskránni. Hesi fáa onga sjálvuppgávu. Hesir persónar eru m.a. løntakarar, ið bert fáa løn frá føroyskum arbeiðsgevara, sum eru flutt um skattaskipanina.

Eru upplýsingarnar á Skattauppgerðini ikki rættar, skal Sjálvuppgáva latast inn. Sjálvuppgávan fæst á heimasíðuni frá 9. mars ella við at venda sær til TAKS tlf. 35 26 00.

Sjálvuppgávan og Fylgiskjalið til Sjálvuppgávuna kann latast inn umvegis **eSkatt.fo.** Loynitalið er upplýst á sjálvuppgávu/skattauppgerð tíni. Sjálvuppgávan kann eisini latast inn sum telefaks, sum fíla við telduposti ella sum vanligur postur.

**Ognaruppgerð**
Tað er bara neyðugt at lata ognaruppgerð inn, um broytingar eru í ogn og skuld í mun til 31. desember 2008. Tó skulu øll tey, sum fáa ognaruppgerð frá TAKS, lata hana innaftur. Ognaruppgerðin fæst við at venda sær til TAKS tlf. 35 26 00.

Sjálvstøðug vinnurekandi við roknskaparskyldu
Sjálvuppgávan við roknskapi og ognaruppgerðin 2010 skal vera TAKS í hendi: **1. mai 2011.**

**Umsókn um longda freist**
Freistin verður bara longd, um serlig orsøk er, t.d. sjúka. Skrivlig umsókn skal latast TAKS. Freistin verður givin eftir avtalu í styttri tíð í senn, men kann ikki verða givin longur enn til 15. august 2011.

Tá biðið verður um longda freist, skal hetta vera gjørt fyri hvønn persón sær, og harafturat verður kravt, at:
- umsóknin er latin inn áðrenn 1. mai 2011
- sjálvuppgávur, roknskapir og ognaruppgerðir fyri eldri ár eru innlatin.

**Kapitalvinningssjálvuppgáva**
Kapitalvinningssjálvuppgávan hjá persónum er partur av sjálvuppgávuni/skattauppgerðini og er prentað á sama skjal.

**Feløg o.t.**
Sjálvuppgáva við roknskapi og kapitalvinningssjálvuppgáva 2010 hjá deyðsbúgvum, feløgum, felagsskapum o.ø. við roknskaparskyldu skulu vera TAKS í hendi í seinasta lagi **1. juli 2011** um roknskaparskeið teirra endar í ella fellur saman við álmanakkaárinum 2010.

**Umsókn um longda freist**
Freistin verður bara longd, tá serlig orsøk er, t.d. sjúka. Skrivlig umsókn skal latast TAKS. Freistin verður givin eftir avtalu í styttri tíð í senn, men kann ikki verða givin longur enn til 15. august 2011.

Tá biðið verður um longda freist, skal hetta vera gjørt fyri hvørt felag sær, og harafturat verður kravt, at:
- umsóknin er innlatin í seinasta lagi 1. juli 2011.
- sjálvuppgávur og roknskapir fyri eldri ár eru innlatin.

Sjálvuppgávur, ognaruppgerðir og roknskapir eru roknað fyri at vera latin inn rættstundis, tá ið tey eru TAKS í hendi í seinasta lagi teir innlatingardagar, sum nevndir eru omanfyri. Fellur seinasti innlatingardagurin á leygardag, sunnudag ella halgidag, verður seinasti innlatingardagur fyrstkomandi gerandisdag.

Er fullfíggjað sjálvuppgáva ikki latin inn rættstundis, hevur TAKS heimild at seta inntøkuna til eina metta upphædd og harafturat at áleggja sekt.

**TAKS-ráðið**
***8. mars 2011***

Postrúm 2151 | 110 Tórshavn | Fax: 35 26 01
Smyrilsvegur 7 | Tlf.: 35 26 00 | T-postur: taks@taks.fo

TAKS

Sosialurin 34 18 00